Magni Arge, formaður í Oljuvinnufelagnum:

Ráðstevnan gav okkum eina realistiska vón

-Vit hava við hesi ráðstevnuni fingið eina meira realistiska støðu til alt oljumálið og eru komin burtur frá tí at ganga og bíða eftir at vinna tann stóra Jackpot vinningin - yvir til at siga, at nú er tað hart arbeiði, sum skal gerast fyri at skilja tað heila betri - og har krevst tol og áhaldni sigur formaðurin í Oljuvinnufelagnum eftir oljuráðstevnuna í Havn mikudagin

OLJURÁÐSTEVNA
Jan Müller

Hóast tað er eitt ár síðani seinastu boring á landgrunninum, og hóast tað gongur eitt hálvt ár til tað næstu boringina, so var oljuráðstevnan í Norðurlandahúsinum merkt av bjartskygni men eisini realismu. Ein av teimum, sum hevur fylgt oljutilgongdini øll árini er stjórin í Atlantsflog og formaðurin í Oljuvinnufelagnum, Magni Arge. Sum ordstýrari á ráðstevnuni hevði hann eisini møguleika at fylgja serliga væl við framløgunum hjá teimum fimm operatørfeløgunum, sum eru á Føroyaøkinum.

Hvat sigur so formaðurin í Oljuvinnufelagnum eftir hesa ráðstevnu:

- Fyrstu vónirnar til eina oljuvinnu og til ein "Jackpot" vóru sera stórar í byrjanini, bæði frá oljufólkunum og okkum sjálvum. Og tí vóru tær báðar fyrstu boringarnar eitt vónbrot fyri mong. Tá Hess so rakti við olju bøtti tað nakað um. Men kenslan hevur tó verið, at tingini hava meira og minni ligið still í eina tíð, og tóktist eisini hugurin at vera væl minni fyri økinum enn hann var frá byrjan. Tíðin hevur verið merkt av mótloysi. Men tað, sum varð lagt fram á Oljuráðstevnuni av øllum feløgunum, vísti hinvegin, at feløgini meta Føroyaøkið sum áhugavert, og at tað verður arbeitt miðvíst við økinum. Tað kom eisini fram, at man í dag er komin til eina meira realistiska støðu, tí nú verður arbeitt út frá nøkrum kendum fortreytum, sum tú ikki hevði frammanundan. Tá tú fyrr hevur bygt uppá ódokumenteraðar vónir, so hevur tú í dag eina rættiliga stóra dokumentatión út frá boringum og tí nógva seismikkinum og ikki minst út frá tí so grundleggjandi fortreytini: at staðfest er ein virkin oljuskipan í økinum.

Magne Arge heldur, at framløgurnar frá oljufeløgunum góvu eina positiva mynd, og aftrat tí fekst tú greitt at vita, at vit mugu hava tol, tí hetta er nakað, sum krevur drúgva viðgerð, tað krevur áhaldandi arbeiði og síðani kontinuitet í arbeiðinum. Tað er ómetaliga týdningarmikið fyri at halda momentum í menningini av føroyska oljuøkinum, at tað verður arbeitt við tí framhaldandi.

Magni Arge heldur vit kunnu siga, at tað eru hend stór framstig í tí at skilja tað føroyska økið, at tað verður arbeitt alla tíðina við hesum og at vitanin harvið mennist sohvørt.

Formaðurin í Oljuvinnufelagnum, sum hevur verið við í oljutilgongdini beinleiðis og óbeinleiðis øll tey mongu seinastu árini, hevði eisini varhugan av, at oljufeløgini veruliga eru tilreiðar at gera ílogur í arbeiðið á landgrunninum - at tey veruliga vilja "comitta" seg til hetta arbeiði. -Tað var sera áhugavert at hoyra umboð fyri eitt nú Agip, sum skal bora næsta ár. Teirra verktætlan er sera spennandi. Tað er eggjandi at vita sær, at tá teir nú fara eftir einum máli - prospekti - byggir tað eisini á tað, sum er komið burtur úr hjá hinum feløgunum - og at teir hava góðar vónir.

Hann heldur tað eisini var sera áhugavert at hoyra umboðini fyri Statoil, BP og Hess. Eisini har fingu vit greiðar ábendingar um, at feløgini arbeiða miðvíst og við eini ætlan at fara undir boringar í 2004.

Magni Arge, formaður í Oljuvinnufelagnum hevur góðar vóni um eina framtíðar oljuvinnu eftir ráðstevnuna í vikuni

Betri mót

- Hetta gevur mær betri mót enn eg kanska hevði undan ráðstevnuni. Vit fingu eina heilt greiða kenslu av, at tað verður arbeitt seriost og miðvíst við Føroyaøkinum, og at tað verða gjørd stór framstig við at skilja umráðið.

Vit hava við hesum fingið eina meira realistiska støðu til alt hetta málið og eru komin burtur frá tí at ganga og bíða eftir at vinna tann stóra Jackpot vinningin yvir til at siga, at nú er tað hart arbeiði, sum skal gerast fyri at skilja tað heila betri og har tað krevst tol og áhaldni.

Magni Arge sigur, at hann eftir fundirnar í gjár á ongan hátt hevur eina fatan av, at nakað av oljufeløgunum vil royna at sleppa burtur úr økinum og heldur brúka pengarnar onkra aðrastaðni. - Man fekk eina fatan av, at summi feløg vóru kanska komin longur at endurskoða sín máta at arbeiða við tí føroyska økinum enn onnur vóru. Men tað var týðuligt, at tey hava fótað sær aftur og byggja nú í ávísan mun uppá eitt nýtt grundarlag, og har tann reyði tráðurin er, at tað fer at taka tíð.

Magni Arge heldur eisini, at framløgan hjá Anadarko var sera áhugaverda. - Teir hava alla tíðina arbeitt út frá tí, at føroyaøkið er eitt torfort øki at arbeiða við, og hava teir lagt á tann tyngra partin, sum er at hyggja niður gjøgnum basaltið, og har teir leita eftir møguligum stórum fundum undir basaltinum. Men hóast teir viðganga, at tað er meira kompliserað enn kanska mett frammanundan, so hava teir ikki mist mótið. Tvørturímóti tykjast teir vilja brúka nógva orku uppá at halda fram við sínum so týðandi kanningum.

- Hvat er so tann mest týðandi meldingin til føroyska almenningin frá slíkari ráðstevnu?

- Tað er tann, at her er eingin skjótur gevinstur at fáa, men vit vita, at vit hava eina virkna oljuskipan, vit hava fingið eitt nógv betri forstáilsi fyri, hvussu tingini síggja út, og við toli og áhaldandi arbeiði og við íloguum í hetta økið, so ivist eg ikki í, at vit finna virknar oljuskipanir, sum eisini fara at løna seg. Men vit mugu hava tol og staðfesta, at hetta kann taka nógv ár.

CONCERTO GROTTO
í Vágatunlinum
Leygarkvøldið 7. desember kl. 20.00 verður konsert verður konsert í Vágatunlinum
Atgongumerki eru at fáa í forsølu á kuanningarstovunum í Havn (tel. 315788) og í Vágum (tel. 213455) - Eita kunnu bíleggjast á telefon 225034
Atgongumerkini kosta 100,- og bussur til konsertina er íroknað prísin. Bussarnir koyra inn kl. 20.00 og konsertin varar umleið 1 tíma
Mett verður kl. 20.00 við tunnlismunnarnar í Vágum og í Leynum
Dávur, Heðin, Kristian, Mikael og Brandur spæla
Konsertin "Djúpt undir Vestmannasund" er ein liður í TUTL-25 ára haldinum
tutl

Betri góðsku og færri feilir

Eirikur Thorvaldsson, stjóri á MBM, fær her ISO9001:2000 góðkenningina handaða. Góðkenningin fevnir um alla móttøku av mjólk, framleiðslu og sølu av mjólk og mjólkarúrdráttum umframt Pop-Top. Aftan fyri stjóran stendur Oyvind Hentze, virkisleiðari á Mjólkarvirkinum.
Mynd: Jens Kr. Vang

Altjóða ISO9001 góðkenningin skal tryggja eina betri góðsku, og í framtíðini verður eisini munandi lættari at finna møguligar feilir, tí við skipanini ber til at skjalprógva gongdina hjá mjólkini, frá bónda til handilshyll, sigur Oyvind Hentze, virkisleiðari á Mjólkarvirkinum hjá MBM í Hoyvík

GÓÐKENNING
Jón Brian Hvidtfeldt

Mjólkarvirkið hjá MBM hevur nú fingið altjóða góðkenning eftir ISO9001:2000 standardinum. Góðkenningin merkir, at fyritøkan nú kann skjalprógva, at hon fylgir altjóða standardum innan góðsku.

Oyvind Hentze, virkisleiðari á Mjólkarvirkinum, sigur, at á virkinum hevur verið arbeitt við innaneftirliti í nógv ár, men at stórsta broytingin nú er, at allar mannagongdir, og alt arbeiði er felt niður á pappír. Endamálið er at virkið til eina og hvørja tíð skal kunna skjalprógva góðskuna á mjólkini, frá tí at hon kemur frá bóndanum, meðan hon fer gjøgnum virkið, og til hon endar úti hjá keypmanninum. Eisini verða royndir goymdar av mjólkini, hvønn framleiðsludag.

Fyri móttakaran, tvs. handilsmannin og í síðsta enda keyparan, merkir broytingin, at er mjólkin ikki í lagi, so ber til hjá Mjólkarvirkinum at fylgja mjólkini allan vegin aftur til bóndan, fyri á tann hátt at finna feilin. Men samtíðis gevur hetta so eisini virkinum møguleika fyri at mótprógva klagur, vísir tað seg, at mjólkin var í lagi, tá hon varð latin handilsmanninum.

ISO9001:2000 góðkenningin hjá Mjólkarvirkinum fevnir um alla móttøku av mjólk frá bøndunum, allar framleiðslu og sølu av mjólk og mjólkarúrdráttum, umframt søluna av leskidrykkinum Pop-Top.

Umfatandi arbeiði

Nógv arbeiði, ikki minst pappírsarbeiði, liggur aftan fyri eina ISO-góðkenning. Oyvind Hentze sigur, at á Mjólkarvirkinum hevur eitt fólk tikið sær av fyrireikingunum at kalla burturav í umleið eitt ár.

Eisini fer ISO-góðkenningin at elva til nakað av eykaarbeiði hjá starvsfólkinum á Mjólkarvirkinum, millum annað verða tað nøkur fleiri skjøl at útfylla. Men virkisleiðarin sigur, at starvsfólkini hava tikið væl ímóti ætlanini hjá leiðsluni at náa altjóða góðkenningini, og eru til reiðar at liva upp til góðkenningina. Tí ISO-góðkenningin krevur, at virkið skal gerast betri og betri alla tíðina.

- Sjálvt um vit nú hava fingið hesa góðkenning, so kunnu vit ikki seta okkum afturá. Tvær ferðir um árið kemur eftirlitið at kanna, um vit framvegis liva upp til góðkenningina, og innan trý ár skal øll góðskuskipanin góðkennast av nýggjum, vísir Oyvind Hentze á, og leggur afturat:

- Eitt krav er eisini, at virkið alla tíðina skal gera skipanina betri, millum annað so feilirnir gerast færri, og góðskan samanumtikið betri.

Endamálið er at nøkta krøvini frá kundum og myndugleikum á føroyska marknaðinum, og í øðrum lagi at menna innanhýsis skipanir, sum tryggja, at MBM kann skjalprógva, at krøvini, fyritøkan setur sær sjálvari, verða yvirhildin.

Skipanin leggur upp til, at øll liðini í framleiðsluni eru kundar hjá hvørjum øðrum, t.d. er goymslan kundi hjá framleiðarunum, tvs. bøndunum, og so framvegis. Á henda hátt kunnu framleiðsluliðirnir hava eftirlit við hvørjum øðrum.

Eisini krevur ISO9001 góðkenningin, at Mjólkarvirkið tvær ferðir um árið skal spyrja keypararnar um teirra meting av góðskuni á mjólkini, mjólkaúrdráttunum og Pop-Top.

Fer at geva úrslit

Oyvind Hentze, virkisleiðari á Mjólkarvirkinum, væntar, at altjóða ISO9001:2000 góðkenningin fer at síggjast aftur.

- Eg vænti, at góðskan gerst betri, og feilirnir færri. Og hetta tilsamans skuldi givið nøgdari viðskiftafólk, sigur Oyvid Hentze. ISO-góðkenningin kann harumframt nýtast í marknaðarføringini av virkinum.